

*Birgir Kruse hugleiddi um mentanina, tá hann setti ólavsøkuna 2003*

# Meðan vit ganga niðaná

**Ein mentanarpolitikkur, har allir føroyingar lyfta í felag, var høvuðsboðskapurin, tá Birgir Kruse setti ólavsøkuna 2003. Hann dvøldi við orðini "at ganga niðaná" og samanbar mentanina við fleirpartasamráðingar, har allir viðkomandi partar kunnu geva sítt ískoyti**

ÓLAVSØKAN 2003
*Tekstur: Ingi Rasmussen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Vit mugu lyfta mentanina fram í einum føroyskum veruleika undir opnum himni. Vit mugu sleppa ímyndini av mentan sum bleyt virði og hugnamentan og seta mentanina í fremstu røð ájavnt við øll onnur virkisøki og høvuðstættir í samfelagi okkara.

Hesi orð vóru kjarnin í røðuni hjá Birgir Kruse, sum setti ólavsøkuna 2003.

Í hesum sambandi tók hann orðini hjá formanninum í Havnar arbeiðsmannafelagi til sín, sum undir drúgva verkfallinum fyrr í ár nevndi hugtakið trípartasamráðingar.

"Í hesum ljósi er greitt, at mentanarhugtakið má støvast av og lyftast fram í ljósið og gerast annað enn hugnamentan, har grundsjónarmiðið er "alt av náði". Náði teirra pengasterku. At listafólkið og mentanararbeiðarin skal verða fátækur sum kirkjurottan og í besta føri liva av teim tilvildarligu molum, sum – alt av náði – falla av ríkmannaborði ein sjáldsaman góðveðursdag.

Skal mentanin fylgja við, meðan vit sum tjóð enn ganga niðaná, so skal hon síggjast í fremstu skildrum, mentanin," segði Birgir Kruse.

Hann leitaði víða. Umvegis Robbie Williams, Baden Powel, Grundtvig og Martin Joensen kom hann til, at føroyingar framvegis ganga niðaná mentanarliga.

Gongan niðaná er tolin, segði hann, og uppgáva føroyinga er at gera orðini hjá skaldinum, ið segði at "Saman at standa, var ei okkum givið" til einkis.

"At skapa eitt mantra, ið frá morgunstundini sigur, at samanhald gevur styrki, at mentanin er fleiritráðað, og listin hevur rætt í framtíðar spádómum og forsjónum. At listin er lygnin, ið lærir okkum sannleikan og ikki neyðin, ið lærir naknu kvinnuna at spinna. Eingin lygn er størri enn hon," segði Birgir Kruse.

Tað var í hesum ljósi, at nýggja føroyska mentanarhugtakið "fleirpartasamráðingar" skal síggjast.

"Mentanin er ein møguleiki. Mikil, múgvandi og mennandi – um fleirpartasamráðingar gerast ein veruleiki í definitiónini av eini egnari mentan, og hvussu hon skal útinnast og umsitast.

Skapandi fólkið er bert EIN partur. Uttan vinnulív gerst tað ein fátækslig gonga niðaná. Uttan skilagóða alemenna fyrisiting, prinsipp og stuðulsmøguleikar, fáa vit upp í stivlarnar longu innan fyrstu steinpirruna, og mentanin gerst ein marra hjá marginaliseraðum masokistum, burturi í óbygdum.

Og miðlarnir, í okkara fráboðaðu gongu niðaná, eru eisini partar í hesi hugsaðu fleirpartasamráðingum. Miðlarnir hava í kunningar- og vitanarsamfelagnum eina uppgávu av teim heilt sjáldsomu. Í okkara dagliga strevi og tosi er ein hending ikki ein hending, fyrr enn hon er staðfest í miðlunum. Tástaðni gerst hon almenn og viðkomandi fyri alt landið. Og hvat gera vit, tá søgan ongantíð kemur? Tá tað fullkomna holrúmið, reint vaacum, er tað einasta vit uppliva í dagsins fjølmiðlaðu gongu niðaná?

Hvat er til ráða at taka, tá eingin ungur og núlivandi rithøvundur hoyrist ella sæst í loftsins halgu miðlum? Listafólk, ið sum fá, kunnu gera ein snøggan tvørskurð av okkara samfelagi?

Ella hvat siga vit við okkara hundraðtals ungu tónleikarar, sum kring landið hava "too much life, running through their veins", men ikki hava so frægt sum eitt spælistað, og tí mugu spæla upp á innantanngittara í ongamannalandi?

Ella myndlistafólkini, sum ikki hava kliva at halla høvur og tíansheldur pensil á? Hvat siga vit við tey, meðan vit ganga niðaná?", spurdi Birgir Kruse, sum helt fyri, at ólavsøkan átti at verið eitt høvi, ein mentanarligur hugsanardagur, har hesi træðrir vórðu knýttir saman í fleirpartasamráðingum.

Hann vísti á, at í nýggja heiminum hevur vinnan sýnt listini so stóran áhuga, at hon gerst ein av fremstu íløgum og listasøvn gerast tempul at vitja. Listin er vorðin sjálvsagdur partur av vinnulívinum, har tað almenna eisini er við – fyrst og fremst við at gera tað áhugavert hjá øllum pørtum.

"Ein inerti er í gongd, sum enntá fær meiningsskapandi miðlarnar at vera við og vísa aktivan áhuga fyri mentan og list.«

Við orðunum hjá Martini Joensen heilsaði hann ungdóminum, sum skal flyta okkum niðaná.

"Millum fjalla standa vit stinn í brekkuni, og kunnu frá hondum, ið sleptu, uppaftur geva hesi orð til ungdómin, ið eigur vegin og viljan at ganga seinasta strekkið – niðaná: Ábyrgdin á tínum herðum, gáva frá okkum til tín, byrða, ið tung er at bera, ber hana betur enn vit«, endaði Birgir Kruse ársins ólavsøkurøðu.









xplore



**Innbjóðing til áhugað at vinnugera Xplore**

**Eni Faroe Branch**

www.eni.it